

Helgi Abrahamsen
*løgtingsmaður*

# Greið tala frá Helle Thorning-Smith

Forkvinnan í danska Javnaðarflokkinum, Helle Thorning-Smith, hevur verið og vitjað føroyska bróðurflokkin í vikuskiftinum. Fríggjakvøldið var hon gestur í Degi og Viku, og ikki óvæntað, varð hon spurd um ríkisrættarligu viðurskiftini.

Helle Thorning stendur fremst í røðini at yvirtaka forsætisráðharrasessin, um vinstravongurin í Danmark vinnur komandi fólkatingsval. Tí var spurningurin áhugaverdur, og svarið var eisini greitt.

Hon staðfesti at føroyingar ráða sjálvir fyri, hvar Føroyar skulu vera í mun til ríkisfelagsskapin.

Føroyingum stendur frítt at definera egin persónlig rættindi í eini stjórnarskipanarlóg.

Skulu Føroyar vera partur av ríkisfelagsskapinum, so mugu vit hava reinar rætningslinjur og fylgja spælireglunum, sum eru galdandi fyri henda felagsskapin.

Hetta er greið tala. Avgerðarrætturin liggur í Føroyum, og tað ber væl til at hava eina føroyska stjórnarskipanarlóg, og kortini vera partur av ríkisfelagsskapinum, men tað setir ávís krøv til innihaldið í lógini.

### Einki er liðugt, fyrr enn alt er liðugt

Stjórnarskipanaruppskotið hevur fingið harðar atfinningar, fyri ikki at vera í samsvari við galdandi reglur, men uppskotið er ikki liðugt viðgjørt, og liggur í løtuni í eini víðkaðari rættarnevnd. Um so er, at ósamsvar er ímillum uppskotið og tann veruleikan, sum vit liva í, so hevur nevndin framvegis møguleika at lurta eftir atfinningunum, og gera broytingar.

Stjórnarskipanarlógin hevur ikki til endamáls at broyta ta ríkisrættarligu støðuna, men hon skal millum annað staðfesta (sum Helle Thorning-Schmidt eisini segði), at Føroya fólk má velja sína egnu kós, tí avgerðarrætturin liggur í Føroyum.

### Demokrati

Stjórnarskipanaruppskotið sigur, at alt vald í Føroyum er hjá Føroya fólki, men hetta merkir ikki, at føroyingar eru leysir av donsku grundlógini. Hetta merkir harafturímóti, at Føroya fólk avger, um vit vilja vera partur av danska ríkinum, og harvið undir grundlógini, ella ikki. Hetta er tað, sum vanliga verður kallað demokrati.

Um føroyingar ikki skulu avgera henda spurningin, hvør skal so gera tað? Fríggjakvøldið fingu vit enn einaferð staðfest, at danskir politikarar vilja ikki hava henda avgerðarrættin.



Richard Danielsen

# Takksemi

*Dýrabiðjudag koyrdu vit ein túr til Vágarnar, vit høvdu okkurt við til leguna í Zarepta*

Legan, sum var í Zarepta hetta dýrabiðudags vikuskiftið, var fyri tey, sum hava brek. Sum eg sat har eina løtu og eygleiddi hesi menniskju, fóru tankarnir at sveima eitt sindur. Eg fór at hugsa um, at tað er eingin sjálvfylgja, at eg havi tann førleika, sum eg havi, tann førleika, sum hesi ikki hava. Tey eru skerd á ymiskan hátt, tey mugu hava fólk hjá sær, sum gera tað fyri tey, sum tey ikki klára at gera sjálv, hesi hjálpa teimum soleiðis, sum nú hvør hevur tørv fyri hjálp, og gott er tað, at so kann vera. Vit eiga at takka fyri, at land okkara er so væl fyri, at vit hava møguleika fyri at hjálpa hesum. Zarepta og tey, sum har stíla fyri og øll tey mongu, sum geva hesar dagar til hesi, eiga eisini stóra tøkk uppborna.

Men, tað er eingin sjálvfylgja, at eg havi hendan førleikan. Eg havi nú livað eitt langt lív og havi kunna arbeitt og klára meg sjálvur, og sjálvt eftir at eg eri pensióneraður, havi eg heilsu til at gera tað, sum eg havi hug at gera, ella føli meg leiddan til at gera, tað er stór náði. Eg má spyrja meg sjálvan: Havi eg takka, sum eg átti fyri hendan frammíhjárætt? Ein danskur sangur, sum vit kenna væl sigur: "Tak er kun et fattigt ord." Men vit gloyma tí verri mangan at siga takk.

Hvi fekk eg hendan frammíhjárætt fram um onnur. Eg havi einki svar uppá tað. Vit vóru nýggju systkin, umframt ein beiggja, sum var deyðføddur. Hví havi eg fingið tey ár, sum eg havi fingið, meðan hann fekk 0 dag, ein annar beiggi bara 28 ár, mamma okkara 100 ár, og eg kundi blivið við at spurt, men fái einki svar. Viðhvørt verður spurt: Hvi letur Gud hetta henda og hví letur hann hatta henda? Vit fá einki svar. Skulu vit ikki heldur spyrja: Hví var eg spardur, tá ið vannlukkan hendi.

Hitt loynda hoyrir HARRANUM Gudi okkara til, men hitt opinberaða er fyri okkum og børn okkara. 5. Mós. 29, 29a

Tað, sum eg havi mest at takka fyri, er at eg lærdi at kenna, at syndir mínar eru fyrigivnar, tí at Jesus tók tær á seg á Golgata krossi ein myrkan dag. Tann myrki dagurin fyri Hann, tá ið hann rópti: Gud Mín Gud Mín, hví ert tú farin frá mær, ger tað at tað myrkur, sum nívdi meg fór burtur, syndin, sum nívdi meg svann burtur, og eg sá hana ikki aftur. Hetta komið eg ongantíð her niðri at duga at takka fyri, sum eg átti.



Dan Reinert Petersen

# Tá nationalisman gerst ein forðing fyri upplýsing

Sonur mín, sum gongur í 3. g, valdi sær Cuba sum evni til høvuðsuppgávuna í vetur. Hann fer sjálvandi á bókasavnið at læna sær tilfar. Har hava tey eina leitiskipan, sum vísir, hvat savnið eigur. Jú, hann slær Cuba inn, men einki úrslit. So roynir hann Kuba. Nú opnar heimurin seg fyri honum. Hann finnur fleiri bøkur um evnið, men allar bøkurnar byrja við C - CUBA.

So spyr mann seg sjálvan: Hví leggur bókasavnið hesa forðingina inn? Svarið er einfalt. Skúlabókagrunnurin gav fyri nøkrum árum síðani eitt »føroyskt atlas« út, har partar av navnatilfarinum hava fingið nýggj nøvn. Summi nøvn eru tikin úr kvæðunum, onnur eru tikin úr høvdinum á týðaranum, og aftur onnur hava fingið eina vánaliga umseting. Henda margháttliga leitiskipanin gav mær blóð á tonnina. Eg fór at googla hesi serføroysku útlendsku nøvnini.

BORGUNDARHÓLMUR: Eg fann nakrar føroyskar skúlabøkur og nakað av íslendskum tilfari.

SIKILOY: Sama úrslit. Nakað av føroyskum tilfari og okkurt á íslendskum ella fornnorrønum.

LÍÐANDISNES. En dysfunksjonell, men hevngjerrig vikingfamilje. Síðan verður víst til Heimskringlu og til Heimsatlas.

GRØNHØVDAOYGGJAR: Bert føroyskt tilfar.

KILI: Her er nógv spennandi at finna, kiliseng, kilimadras, kiliradio. Og so stendur Kilimanjaro, sum er eitt fjall í Afrika og ikki eitt land í Suðuramerika.

Eg royndi at googla fleiri av hesum sjáldsomu nøvnunum, men onki brúkiligt at finna.

Eg undirvísi á einum spildurnýggjum skúla við elektroniskum talvum og ongum landakorti undir loftinum. Kortini verða tikin av internetinum og standa á talvuni við sínum geografisku nøvnum, sum vit kendu tey, áðrenn hetta famøsa atlasið kom út.

Út frá hesum omanfyri kann sigast, at tað almenna forlagið Skúlabókagrunnurin leggur okkara børnum og ungdómi forðingar í vegin, tá tey skulu leita sær upplýsing. Hetta man vera eindømi í allari verðini.

Eitt annað fyribrigdi, sum er aktuelt í hesum sambandi, er, at vit lesa ikki bókstavir, men vit lesa orð ella rættari orðamyndir, sum vit fáa assosiatiónir av. Hetta er sera mennandi fyri barnið. Síggja vit myndina Sicilia, hugsar onkur um suðurfruktir og onnur um Mafiuna. Síggja vit myndina Chile, hugsar onkur um Allende, sum fall fyri Pinochet, meðan onnur síggja lamair og indianarar í bovlarahatti.

SIKILOY og KILI geva onga assosiatión annað enn tøð, heimføði og nationalismu.

Júst hetta við assosiatiónunum og orðamyndum ger tað neyðugt, at vit hava alt tað latínska alfabetið og loyva C, Q, W, X og Z, tí hesir stavirnir eru ein partur av okkara medviti.

Myndin Quisling vekir andstygd, men Kvisling hevur onga ávirkan á medvitið.

Eg havi eisini roynt at googla Kolumbus, sum Columbus eitur í skúlabókum. Jú, eg fann eina bussrutu í Rogalandi og eitt hotell í Berlin og mangt annað óviðkomandi.

Mynduleikarnir leggja av nationalistiskum orsøkum ungdóminum fótonglar í vegin fyri upplýsing. Og so fýlast teir á PISA-úrslitið.

Gud forbarmi seg...